# Góðu vinir í fakfelagssamstarvum....

*samanumtikið meta vit í Miðflokkinum, at fakfeløg og flokkurin taka lut í einum felagsstríði, sum hevur trygd og trivnað føringsins sum fremsta mál*

Seinastu árini eru Føroyar, eftir meting Miðfloksins, stýrdar eftir meginreglum, sum tíverri ikki hava havt trivnað allra fyri eyga. Dømini eru ótald, sum stuðla undir hesar hugsanir, heilt frá óneyðuga skattalættanum, ið varð framdur í óðum verkum, til mongu harmiligu álopini, sum miðvíst eru framd móti veikastu samfelagsborgarunum okkara.

Øll tey, sum hava havt stundir og áhuga at fylgja við í politiska orðaskiftinum, kunnu ikki annað enn hava lagt merki til miðvísu royndir Miðfloksins aftur og aftur at gera vart við eina av meginreglunum undir politiska arbeiðinum, at tryggja trygd og trivnað teirra veikastu, teirra á sonevndu niðastu rókum samfelagsins. Í tí málinum sá flokkurin seg noyddan til, fyri at vísa ónøgd okkara við førda politikkin á almanna-økinum, at seta fram mísálit á landsstýriskvinnuna á økinum. Eitt misálit, sum tíverri ikki vann frama.

Viðvíkjandi lønarsamráðingum, í privata ella almenna geiranum, er hugsan Miðfloksins púra greið og óbroytt, at talan er um mál millum fakfeløgini og arbeiðsgevaran, og at politiska valdið á ongan hátt má blanda seg í hesi viðurskifti.

Annars eru vit í Miðflokkinum púra samd við fakfeløgunum í harmi tykkara um, at teir flokkar, sum søguliga vardu limir tykkara og í skjaldramerki sínum enn siga seg standa fakfeløgunum nær, ferð eftir ferð svíkja tað álit, tit vísa teimum.

*Vegna Miðflokkin,*

***Bill Justinussen***
***Karsten Hansen***
***Jenis av Rana***



Altíð tað nýggjasta

Fjeppari?
Les um ítrótt
í Sosialinum



ÍBÚÐ
TIL SØLU
ÍBÚÐ Í MARITUGØTU
TIL SØLU
TEL. 218154
Sosialurin 341800




ÚTBJÓÐING

Leyst innbúgv til Ellis- og røktarheimið og Økisdepilin fyri sinnisveik í Vági

Við hesum verður leyst innbúgv í sambandi við omanfyri nevndu stovnar boðið út alment.

Lisitatiónin verður á Landsverki, Tinghúsvegi 5, Tórshavn, hósdagin 25. november 2010 kl. 14.00.

Útbjóðingartilfarið fæst við at venda sær til Landsverk á 340 800 ella á hdl@lv.fo í seinasta lagi mánadagin 15. november 2010 kl. 12.00.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, 110 Tórshavn | Tel. 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er stovnur undir Innlendismálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleika-uppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvøllir, herundir tyrlupallar.*